# Várkonsert við Manskóri

**Norðurlandadagin, sunnudagin hin 23. mars, hevur Tórshavnar Manskór várkonsert í Norðurlandahúsinum. Seinni í vár fer kórið á sættu uttanlandsferðina**

KONSERT

Tórshavnar Manskór, sum telur 32 mans, var fyrst ferð at hoyra í mars 1987. Nú sekstan ár seinni verða teir afturat at hoyra á sama palli - í Norðurlandahúsinum.

Á Várkonsertini hjá Tórshavnar Manskóri, fara bæði Bjarni Restorff og Sunleif Rasmussen at stjórna kórinum. Konsertskráin verður merkt av tilstundandi uttanlandsferðini og kappingini í Cornwall.

Sunnudagurin er haraftúrat Norðurlandadagur og tí verður ein stuttlig norðurlendsk duett á skránni, har Mads Winther og Høgni Højgaard fara at syngja tríggjar sangir úr Gluntarne.

Hesi sekstan árini hevur Tórshavnar Manskór givið út tvær fløgur við tilsamans 29 sangum, nýskrivaðar og eksperimenterandi, eins og góðar gamlar kenningar.

Manskórið hevur ferðast víða og fer hin 30. apríl aftur á ferð. Hetta er sætta uttanlandsferðin og leiðin gongur til Cornwall í Bretlandi. Har verður skipað fyri stórari kórstevnu og kapping fyri manskór. Hetta er fyrsta stevnan av sínum slagi og 47 manskór úr tíggju londum hava boðað frá luttøku. Tilsamans eru mansrøddirnar fleiri enn tveytúsund.

Umframt framførslur í Truro Cathedral og Eden Project, verður Tórshavnar Manskór við í eini sangkapp-ing í Cornwall. Kappingin er býtt upp í kór við fleiri enn og færri enn 40 monnum. Við Tórshavnar Manskóri fara 31 mans til Cornwall. Tí verður kórið í seinna bólkinum, har 11 onnur kór hava boðað frá luttøku.

Hin londini, sum eru við á kórstevnuni í Cornwall eru Armenia, Hollandi, Ungarn, Estland, Finnland, Slovenia, Írland, Ongland og Wales.

Tórshavnar Manskór hevur egnu heimasíðu og har til ber at lesa um kórið og søgu tess. Adressan er: www.manskor.fo

Várkonsertin við Tórshavnar Manskóri verður í Norðurlandahúsinum Norðurlandadagin, sunnudagin hin 23. mars klokkan 16. Atgongumerki á 80 krónur fáast í Húsinum og í Kunningarstovuni í Havn.



*Tórshavnar Manskór í 2000*



# Evfori á foriskum palli

SJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Evropa eigur eina livandi sjónleikatradisjón, og har smæðast Foringar als ikki burtur. Vit hava í størthundrað ár javnan sett leikir upp runt um landið alt, og hóast nøkur feløg kanska eru minni aktiv í løtuni, enn tey kanska hava verið fyrr, so stendur sjónleikurin í Foroyum í føgrum blóma.

Gríma fyllir 25 og setur upp gandakvæðið mikla um Per Gúnt. - Góða eydnu við tí, og vit hopa, at Perurin finnur tað, hann leitar eftir.

Men fyri at mestsum at sitera Sebastian, so eru tey ikki aleina.

Nei, Havnar Sjónleikarafelag er eisini úti um seg í hesum døgum.

Tað er ein leikur av nakað øðrvísi sniði og nokkso annarleiðis innihaldi, og tó tí tað snýr seg eisini um søkjandi menniskjur.

Einki er sum mammusa gras eitur leikurin, sum hevur frumframforslu í Sjónleikarahúsinum leygardagin tann 29. mars. Og vit kunnu, uttan at siga ov nógv avdúka, at tað handlar um fólk, sum nýta evforiserandi evnir. Tað er Jón Joensen, sum hevur týtt leikin til forist og Jákup Veyhe sum leikstjórnar.

## Sosialurin um vikuskiftið

Hetta vikuskiftið hittist Sosialurin á 220567, har Heri á Rógvi fegin tekur ímóti tíðindum. Hann hittist eisini á telduposti: heri@sosialurin.fo






**MAXDA 323 S 2,0 DIESEL LX**
Árg 08/98, Diesel. Kr. 100.000 .



**MAZDA 323 S 1,5I LX**
Árg 01/98, Km 73.000. Kr. 76.000



**SUZUKI ALTO 1,0 GL**
Árg 04/97, Km 45.000. Kr. 45.000



**MAZDA 323 S LX 2,0 DIESEL**
Árg 10/99, Km 67.000. Kr. 115.000



**MAZDA323 S 2,0 DIESEL LX**
Árg 12/99, Km 53.000. Kr. 115.000



**RENAULT MEGANE 1,6E**
Árg 12/96, Km 70.000. Kr. 60.000



**MAZDA 323 S 1,5I GLX AUTOMATIC**
Árg 02/98, Km 85.000. Kr. 86.000



**MAZDA 626 HB 2,0I GLX**
Árg 05/96, Km 100.000. Kr. 86.000



**RENAULT MEGANE 1,6E**
Árg 04/99, Km 73.000. Kr. 118.000



**MAZDA 323 F 1,5I GLX**
Árg 04/99, Km 54.000. Sportfelgur, spoilari. Kr. 95.000 .



**FORD ESCORT 1,6I H/B**
Árg 09/96, Km 67.000. Spoilari/sportfelgur. Kr. 74.000



**TOYOTA CORROLLA 1,6I SED LINEALUNA**
Árg 08/98, Km 71.000. Kr. 85.000



**MAZDA 626 S 2,0 GLX**
Árg 03/90, Km 158.000. 12CD-box. Kr. 38.000 .



**FORD ESCORT 1,8 DIESEL SEDAN**
Árg 08/95, Km 146.000. Diesel Sleipikrók. Kr. 55.000 .

**VØRUVOGNAR**



**MAZDA B2500 4X2 STDCAB DX**
Árg 1986, Km 220.000. Kr. 25.000



**MAZDA 323 S 2,0 DIESEL LX**
Árg 09/97, Km 115.000. Kr. 85.000



**RENAULT KANGOO**
Árg 2001, Km 25.000. Kr. 120.000



**FORD ESCORT 1,6I VØRUVOGNUR**
Árg 04/97, Km 69.000. Kr. 58.000

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35





**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

## Sjúkrarøktar-frøðingur

Eitt starv sum sjúkrarøktarfrøðingur á sjúklingadeildina við einari arbeiðstíð uppá 0,7 í skiftandi vaktum er leyst til setan frá 1. mai 2003.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 37 11 33 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum og autorisatión skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
**Suðuroyar Sjúkrahús**
Boks 51
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreist 7. apríl 2003.**



## Íbúð í Tórshavn ella nærhendis

Søkt verður eftir eini íbúð í Tórshavn ella nærhendis til eitt av starvsfólki okkara, fyribils í 7 mánaðar, frá apríl at rokna.

JARÐFRØÐISAVNIÐ

**Tlf. 35 70 00**



Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Útleiguamboð

**Skal tú brúka amboð í styttri tíð?**
**Hví eiga, tá ið tú kann leiga?**

**Til keyps og leigu:**
- Gravimaskinur
- Trumlur
- Lessimaskinur
- Arbeiðsskúrar
- Luft kompressarar og boriútgerð
- Stillads- og forskallingsútgerð
- Umframt mangt annað!



Sosialurin 311820


## Aðalfundur

BSF (Badmintonsamband Føroya) hevur aðalfund í ÍSF-húsinum, Tórshavn, tann 24. apríl 2003 kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Uppskot, sum ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 10. apríl.

**Nevndin**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3523
**Navn:** Sp/f Norðoya Tannrøkt
**Adressa:** Uppsalagøta 56, 700 Klaksvík

**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
**Stovningardato:** 01.03.2003
**Viðtøkudato:** 01.03.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Berghild Gullaksen, Uppsalagøta 56, 700 Klaksvík.
**Stjórn**: Berghild Gullaksen, Uppsalagøta 56, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** : P/F Føroyabók, v/ Victor Nielsen, Vágstún, Box 144, 700 Klaksvík.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.03.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er keyp og søla, veitan av heilsutænastum, serliga innan tannatøkt, og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3003, Sp/f Blátt, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 12.02.2003.
**Stjórn**:
Farin frá sum stjóri: Martin Leander Ansbjørn, Marknagilsvegur 53, kj., 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3206, Sp/f Vørðslan, 530 Fuglafjørður.

**Viðtøkur broyttar:** 15.12.2002.
**Kapitalur:** Hækking við kr. 20.000,00 til kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 20.000,00 við skuldarumskifti til kurs 1500.

*Skráseting Føroya tann 20. mars 2003*
*Kristin Balle*


# Vit fáa nýggja sending mánadagin



## Mazda 6

Sosialurin 311820

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Byggi og býar-skipanardeildin**

Byggi- og býarskipanardeildin er partur av teknisku fyrisitingini. Á deildini starvast 13 fólk.

Arbeiðsøkini eru í høvuðsheitum:
· planlegging
· lendisumsiting
· byggimál
· húsaumsiting

Vit bjóða eitt áhugavert starv við búningarmøguleikum og góðum arbeiðsviðurskiftum.

Byggi- og býarskipanardeildin er í gamla posthúsinum í Havn, í sama bygningi sum Snarskivan og Tekniska deild.

www.torshavn.fo

## Býararkitektur

Tórshavnar kommuna søkir eftir býararkitekti at byrja skjótast til ber. Býararkitekturin er, við tilvísing til tekniska stjóran, leiðari fyri byggi- og býarskipanardeildini,

**Høvuðsuppgávurnar**
hjá býararkitektinum eru m.a. at:
- leiða og skipa arbeiðið á deildini
- ganga á odda við planlegging í síni heild
- luttaka í fíggjarætlanararbeiði og ansa eftir at játtanir verða fylgdar
- veita serkøna hjálp og samskifta við nevndir, viðskiftafólk, stovnar og fyritøkur
- vera skrivari hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið roknar við at umsøkjarin**
- hevur hugflog og skapandi gávur, við atliti til at menna býin
- hevur kunnleika til økið og er útbúgvin arkitektur
- gongur á odda, er sjónligur, opin og motiverandi
- dugir væl at fyrisita og samskifta bæði innan- og uttanhýsis
- hevur leiðsluroyndir, er málsøkjandi og til reiðar at taka avgerðir
- er positivur og dugir væl við starvsfólki

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Arkitektafelagið, við ískoyti á 17. stigi. Setanin verður við tvey ára royndartíð.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, ella Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. apríl 2003 kl. 13:00. Viðmerk á brævbjálvan "Býararkitektur".